# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 2. oktober 2018

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um talgildan samleika**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**talgildan samleika**

*Virkisøki*

**§ 1.** Løgtingslógin fevnir um fyrisiting og nýtslu av talgildum samleika.

**§ 2.** Landsstýrismaðurin ger av, hvør KT-loysn skal verða nýtt sum talgildur samleiki og fevnd av hesi løgtingslóg, sbrt. § 1.

*Allýsingar*

**§ 3.** Í hesi løgtingslóg merkir:

1) Talgildur samleiki: Almenna føroyska KT-loysnin til elektroniska eyðmerking av brúkarum og til elektroniska undirskrift.
2) Tænastuveitari: Almennur stovnur ella virki, ið bjóðar fram tænastu, har talgildur samleiki verður nýttur sum elektronisk eyðmerking ella elektronisk undirskrift.
3) Tænasta: Talgild tænasta frá tænastuveitara, ið krevur talgildan samleika til elektroniska eyðmerking av brúkarum ella elektroniska undirskrift.
4) Brúkari: Likamligur persónur, ið nýtir talgilda samleikan til tænastu frá tænastuveitara.
5) Elektronisk eyðmerking: Elektronisk viðgerð, ið sannar eyðmerkingina av einum persóni.
6) Elektronisk undirskrift: Dátur í elektroniskum formi, ið eru viðfestar ella logiskt sambundnar við øðrum elektroniskum dátum, og sum brúkari nýtir sum undirskrift.

*Rættarvirknaður av undirskrift*

**§ 4.** Elektronisk undirskrift við talgildum samleika hevur sama rættarvirknað sum handskrivað undirskrift.

*Stk. 2.* Stk. 1 ávirkar ikki serlig lógarásett formkrøv ið kunnu vera til undirskrift, undir hesum krøv um handskrivaða undirskrift.

*Kravd luttøka*

**§ 5.** Allir almennir stovnar og partafeløg, sum tað almenna eigur partapeningin í, undir hesum:

- stjórnarráð og stovnar undir hesum,
- serligir grunnar o.a.,
- sjálvsognarstovnar, ið eru á fíggjarlógini javnbjóðis teimum rættiligu landsstovnunum
- kommunur og stovnar undir hesum og
- kommunal samstørv,

skulu loyva persónum at nýta talgilda samleikan, um stovnurin veitir tænastu, ið krevur elektroniska eyðmerking av persónum ella elektroniska undirskrift.

*Stk. 2.* Peningastovnar skulu loyva persónum at nýta talgilda samleikan, um peningastovnurin veitur tænastu, ið krevur elektroniska eyðmerking av persónum ella elektroniska undirskrift.

*Sjálvboðin luttøka*

**§ 6.** Privata vinnan kann nýta talgilda samleikan til elektroniska eyðmerking av persónum og til elektroniska undirskrift.

*Fyrisiting*

**§ 7.** Persónar, ið eru minst 15 ár, hava føroyskt p-tal og kunnu skjalprógva sín likamliga samleika nøktandi, kunnu biðja um at gerast brúkarar av talgilda samleikanum, sbrt. reglum í hesi løgtingslóg ella við heimild í hesi løgtingslóg.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann loyva øðrum persónum enn teir nevndir í stk. 1 at gerast brúkarar við fullum ella avmarkaðum rættindum til talgilda samleikan.

*Stk. 3.* Fyrisitingin av talgilda samleikanum hevur heimild at heinta viðkomandi upplýsingar úr kundaskráum hjá veitarum av fjarskiftistænastum.

**§ 8.** Landsstýrismanninum verður heimilað at útveita umsitingina av brúkarum og útflýggjan av talgildum lyklum til brúkarar av talgilda samleikanum til privat virki.

*Stk. 2.* Avgerðir, ið privat virki hevur ella fer at taka, sbrt. stk. 1, skulu lúka treytir í løgtingslóg um fyrisitingarlóg.

**§ 9.** Landsstýrismaðurin kann áseta nágreiniligari reglur fyri, hvussu talgildi samleikin skal verða fyrisitin, sbrt. §§ 7-8, umframt reglur fyri starvsfólk, tænastuveitarar, brúkarar og annað knýtt at talgilda samleikanum, undir hesum KT-trygd, karmar og politikkir.

*Kærumál*

**§ 10.** Avgerðir tiknar sambært reglum í hesi løgtingslóg ella við heimild í hesi løgtingslóg kunnu kærast til landsstýrismannin í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleika sín sambært løgtingslógini til eina kærunevnd, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina.

*Stk. 3.* Kærumyndugleikin, sbrt. stk. 1-2, kann biðja um allar tær upplýsingar frá privatum virkjum sbrt. § 8, stk. 1, ið eru neyðugar fyri kæruviðgerðina.

*Tagnarskylda og revsing*

**§ 11.** Persónar, ið útinna uppgávur sbrt. hesi løgtingslóg ella við heimild í hesi løgtingslóg, umframt onnur, ið eru teimum til hjálpar hesum viðvíkjandi, koma undir revsiábyrgd sbrt. §§ 152-152f í revsilógini. Hesir persónar hava tagnarskyldu mótvegis øðrum, hvat viðvíkur upplýsingar um persónar og um KT-skipanina handan talgilda samleikan, serliga hvat viðvíkur tøkni, trygd og bygnað og um tilgongdir, viðlíkahald og rakstur av trygdarviðurskiftum.

**§ 12.** Er ikki strangari revsing í hesari ella aðrari lóggávu, sektast við bót tann, ið við vilja ella av grovum ósketni brýtur ásetingar ásettar við heimild í § 9.

*Gjald*

**§ 13.** Landsstýrismaðurin kann áseta nágreiniligari reglur um gjald fyri

útreiðslur, sum landið hevur av talgilda samleikanum.

*Talgildi samleikin uttanfyri Føroyar*

**§ 14.** Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur við onnur lond og samveldi um viðurkenning og brúk av talgilda samleikanum og líknandi samleikaloysnum hjá hvør øðrum.

*Gildiskoma*

**§ 15.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, § 4, stk. 1 og § 5 undantikin.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, nær § 4, stk. 1 og § 5 koma í gildi.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Landsstýrið hevur sett á stovn verkætlanina Talgildu Føroyar.

Verkætlanin er í heildarætlanini um Talgildu Føroyar deild upp í fýra tættir:

- KT arkitekturur (Heldin)
- Grundardátur
- Talgildar tænastur (Tænastuportalurin)
- Talgildur Samleiki

Talgildi samleikin, ið hetta lógaruppskot fevnir um, er sostatt ein av teimum fýra tættunum í Talgildu Føroyar verkætlanini.

Talgildu Føroyar, sum Talgildi samleikin er týðandi partur av, hevur til endamáls at gera eitt framkomið talgilt undirstøðukervi fyri alt tað føroyska samfelagið.

Við Talgildu Føroyum fáa føroyingar:

- Amboð, ið kunnu gera gerandisdagin léttari, tryggari og spara tíð.
- Eitt talgilt persónligt samleikaprógv (kann eitt nú nýtast til at undirskriva løgfrøðiliga bindandi avtalur)
- Eitt persónligt login (innritan) til allar skipanir hjá øllum tí almenna geiranum og fleiri størri fyritøkum (í staðin fyri, at hava fleiri ymisk login til eitt nú TAKS, SEV, netbankan v.m.)
- Atgongd til almennar og flestar privatar tænastur á netinum savnaðar í einum persónligum portali.
- Størri sjálvræði yvir upplýsingum um seg sjálvan í ymsum skipanum. Borgarin fær yvirlit yvir allar dátur, ið eru skrásettar um borgaran sjálvan, og atgongd til at dagføra upplýsingar á einum og sama staði.
- Størri trygd í dátasamskiftinum millum myndugleikar, fyritøkur og borgarar.

Við Talgildu Føroyum fær føroyska vinnulívið:

- Amboð, ið kunnu styrkja kappingarførið, geva nýggjar møguleikar og skapa størri framleidni (øktan produktivitet)
- Eitt talgilt samleikaprógv (kann eitt nú nýtast til at undirskriva løgfrøðiliga bindandi avtalur)
- Eitt virkislogin (innritan) til allar skipanir hjá øllum tí almenna geiranum og fleiri størri fyritøkum.
- Ókeypis atgongd til grundardátur (Eitt nú um bústað, kort data o.s.fr.)
- Møguleika at nýta unikar lyklar til at eyðmerkja persónar og virki
- Atgongd til almennar og flestar privatar tænastur á netinum savnaðar í einum og sama portali
- Møguleika at veita talgildar tænastur til borgaran og onnur virki umvegis ein felags portal

Við Talgildu Føroyum fáa kommunur, land og samfelagið sum heild:

- Møguleikan fyri sjálvsavgreiðslu av øllum almennum tænastum
- Møguleikan fyri nýggjum og betri talgildum tænastum til borgarar kring alt landið.
- Møguleika at veita tænastur til fólk við serligum avbjóðingum – eitt nú sjón- og hoyriveik – í størri mun enn í dag.
- Møguleika fyri ókeypis atgongd til grundardátur (eitt nú hjá tinglýsing og persónsyvirliti)
- Lættari yvirlit yvir allar almennar dátugrunnar
- Trygt samskifti millum dátugrunnar
- Betri framleidni í almenna og privata geiranum
- Størri búskaparvøkstur

## Tvørgangandi samstarv um verkætlan

Talgildu Føroyar byggir á eitt tvørgangandi samstarv. Tað hevur frá byrjan verið eitt ynski, at land, kommunur, almennar fyritøkur, felagsskapir, grunnar og privatar fyritøkur samstarva um fígging og menning av Talgildu Føroyum. Landið hevur tó høvuðsábyrgdina og eigur verkætlanina, og rindar tí eisini størsta partin av verkætlanini. Allir samstarvspartar, ið luttaka í verkætlanini, fáa umframt ávirkan á verkætlanina, eisini fíggjarligan fyrimun, tá Talgildu Føroyar verða settar í verk.

Ein stór avbjóðing við talgildum loysnum er, at tær støðugt skulu mennast, so tær áhaldandi eru tíðarhóskandi og hóska til tørvin. Skulu vit loysa hesa avbjóðingina, er neyðugt, at størstu áhugapartarnir, ið fara at gagnnýta talgildu frambrotini í framtíðini, eru knýttir at verkætlanini og fáa ávirkan á, hvussu talgilda undirstøðukervið verður framyvir. Við hesum leisti verður tryggjað, at menningin hóskar til tørvin í samfelagnum, og at fleiri partar hava áhuga í eini støðugari menning av talgilda undirstøðukervinum.

Talgildu Føroyar er eisini kjølfest breitt í politisku skipanini. Verkætlanin gongur tvørturum valskeið, og bæði samgonguflokkar og andstøðuflokkar hava verið við til at gera verkætlanina til veruleika.

## Lýsing av Talgilda samleikanum

Talgildur samleiki er KT-loysn til elektroniska eyðmerking av persónum og elektroniska undirskrift, ið kann nýtast á talgildum tænastum, so sum á borgaraportalum og talgildum sjálvgreiðslum, bæði hjá almennum stovnum og privatum virkjum.

Tørvurin at kunna eyðmerkja seg talgilt á tryggan hátt er alsamt vaksandi. Fleiri talgildar tænastur eru, ið krevja elektroniska eyðmerking, tá ið borgarin skal hava ella senda upplýsingar, millum annað trúnaðarupplýsingar fyri stovnar og virkir.

Ein talgildur samleiki ger tað skjótari og einfaldari hjá borgarum at avgreiða síni viðurskifti talgilt. Fyri einstaka borgaran fær tað stóran týdning, at hann frameftir fær ein samleika og eitt log-in, ið hann kann nýta til allar skipanir. Í dag er neyðugt at halda skil á einari langari røð av loyniorðum. Í dag noyðast borgarar at geva somu upplýsingar til fleiri ymiskar almennar myndugleikar. Frameftir skulu somu upplýsingar bert gevast einaferð. Hetta fer at merkja, at upplýsingarnar verða rættari og tryggari.

Samstundis verða mannagongdir hjá almennum stovnum og vinnuni minni tíðar- og orkukrevjandi, tí sloppið verður undan eitt nú at ljóslesa skjøl.

Talgildi samleikin skal vera ein einføld, trygg og felags loysn fyri alt tað føroyska samfelagið. Við eini felags loysn, kann borgarin nýta ein og sama hátt til allar (flestu) talgildar innritanir. Á henda hátt skulu fleiri líknandi loysnir ikki mennast til einstakar tænasturnar, ið krevja elektroniska eyðmerking ella undirskrift. Ein felags loysn fyri alt samfelagið fer væntandi at hava munandi sparingar í tíð og umsiting við sær fyri allar partar.

Talgildi samleikin verður eitt tilboð til allar borgarar í Føroyum, harímillum tey, ið bera brek ella á annan hátt hava serligar avbjóðingar. Ætlanin er ikki, at loysnin verður eitt krav fyri borgarar. Tí kunnu borgarar, ið ikki ynskja at nýta talgilda samleikan, velja hesa loysn frá. Harumframt skulu allar persónsupplýsingar verða viðgjørdar við virðing fyri tí persónliga frælsinum sambært løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

Yvirskipaða endamálið við talgilda samleikanum er:

- **Ein felags loysn (breið undirtøka)**

Borgarar, vinna og tað almenna skulu kunna nýta loysnina í samskifti sínámillum. Loysnin skal kunna nýtast í øllum samfelagnum, so at borgarin kann nýta talgilda samleikan til at eyðmerkja seg hjá almennum stovnum og privatum virkjum.

- **Føroyskir førleikar og veitarar**

Føroyskir veitarar verða nýttir, so ein kann tryggja sær, at neyðugir førleikar eru her heima, og at framtíðar rakstur og menning ikki eru bundin at útlendskari arbeiðsmegi.

- **Trygg loysn**

Loysnin skal vera trygg, og lúka lóggávu og regluverk fyri økið, umframt krøv hjá Fíggjaeftirlitinum um trygd og reglur fyri hvítvask.

- **Einføld og nýsluvinarlig**

Loysnin skal vera einføld og løtt at nýta hjá borgarum.

- **Framtíðartryggjað og altjóðagjørt**

Loysnin skal vera framtíðartryggjað og smidlig í bygnaði, og kunna mennast til nýggjar tørvir. Hon skal eisini vera í samsvari við altjóða standardir og loysnir. Føroyski talgildi samleikin skal í framtíðini kunna nýtast í øðrum londum.

- **Málið skal vera føroyskt og enskt**

Málið og alt samskifti til brúkaran skal vera á føroyskum. Við fyriliti fyri útlendingum skal tað eisini vera á enskum.

- **Ognarskapur og staðseting skulu vera føroysk**

Tað almenna eigur og umsitur høvðuspartarnar, sum fevna um trygdina. Persónupplýsingar um borgaran og høvðuspartarnar av loysnini verða staðsettir í Føroyum. (Talgilt yvirræði).

- **Fíggarligt skynsemi**

Samsvar skal vera millum vavið á loysnini og fíggingina.

**Tilgongdin at fáa ein føroyskan talgildan samleika**
Í juni 2015 varð strategi fyri Talgildu Føroyar, harímillum eisini strategi fyri talgilda samleikan, løgd fram, og á heysti 2015 varð fyrireikingararbeiðið sett í verk fyri talgilda samleikan.

Tann 1. juli 2016 var samstarvsavtala undirskrivað millum landsstýrið og felagið fyri føroyskar peningastovnar um, at føroyingar skulu kunna nýta føroyska samleikan til tænastur hjá peningastovnunum, og at peningastovnarnir vóru við til at fíggja verkætlanina.

Á vári 2017 varð lóg um Talgildu Føroyar samtykt á Løgtingi, og varð menningin av talgilda samleikanum send í útboð. Hetta útboðið vann eitt samtak millum Klintra og Føroya Tele. Væntandi verður loysnin liðugt ment í 2018 og klár at taka í nýtslu fyrsta ársfjórðing av 2019.

Raksturin av talgilda samleikanum varð sendur í útboð 20. apríl 2018. Elektron vann útboðið, og skal tískil taka sær av rakstrinum fyrstu fimm árini 2019-2023.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Í dag er eingin lóggáva um ávísa almenna KT-loysn til elektroniska eyðmerking og elektroniska undirskrift. Tó eru krøv í galdandi lóggávu, ið loysnin skal mennast í samsvari við. Serliga løgtingslóg um elektroniska undirskrift (løgtingslóg nr. 74 frá 25. mai 2009), ið hevur til endamáls at fremja trygga og virkna nýtslu av elektroniskum samskifti, og verður hetta gjørt við at seta krøv til ávísar elektroniskar undirskriftir og til lyklamiðstøðir, ið geva út prógv (sertifikatir) til elektroniskar undirskriftir.

Føroyska lógin um elektroniska undirskrift vísur til ES-direktiv 1999/93 EF, sum er farið úr gildi, og tí verður arbeitt við at endurskoða lógina um elektroniska undirskrift. Tó eru krøvini í lógini framvegis galdandi og aktuell fyri talgilda samleikan.

ES-forordning um elektroniska eyðmerking og álitistænastur (EU-forordning nr. 910/2014 af 23. juli 2014 – hereftir eIDAS), regulerar í dag hetta umráðið í ES. eIDAS fevnir um eitt størri lógarøki enn føroyska lógin um elektroniska undirskrift ger. Lógin er tó ikki í andsøgn við hesa, hóast hon í nøkrum førum setur eyka krøv, umframt tey ið finnast í føroysku lógini um elektroniska undirskrift.

Avgjørt er, at talgildi samleikin skal mennast í samsvar við krøv í eIDAS. Hetta skal tryggja, at talgildi samleikin í framtíðini kann viðurkennast sum elektroniskt samleikaprógv og bindandi undirskrift í ES-londum umframt øðrum londum.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Talgildi samleikin fer væntandi at hava øktan týdning í dagligdegnum hjá føroyinginum samstundis við at fleiri almennar og privatar tænastur gerast talgildar og krevja, at talgildi samleikin verður nýttur. Tí er neyðugt, at løgfrøðiligu karmarnir rundan um loysnina eru greiðir.

Niðanfyri lýsast høvuðsendamálini við lógaruppskotinum:

*Greiðar løgfrøðiligir karmar fyri borgaran*
Lógaruppskotið skal tryggja týðiligar løgfrøðiligar karmar fyri borgarans rættindi og skyldur viðvíkjandi talgilda samleikanum. Hetta skal tryggja rættarstøðu borgarans á hesum øki, serliga við at áseta, hvørjir borgarar hava rætt til at fáa ein talgildan samleikan umframt at

geva høvi til at kæra t.d. um borgarin verður noktaður at fáa ein talgildan samleika ella um talgildi samleikin verður gjørdur óvirkin.

*Krav at almennir stovnar, almenn partafeløg og peningastovnar nýta loysnina*
Lógaruppskotið ásetur, at allir føroyskir almennir stovnar og almenn partafeløg, bæði undir landi og kommunum, og peningastovnar, sum veita tænastur, ið krevja elektroniska eyðmerking av persónum ella elektroniska undirskrift, skulu loyva persónum at nýta talgilda samleikan.
Endamálið við hesum er:

- at borgarin ikki skal nýta fleiri ymiskar loysnir til elektroniska eyðmerking og elektroniska undirskrift til almennar tænastur
- at tað hevur sparingar við sær fyri tað almenna, tá talan er um eina felags loysn, heldur enn at hvør stovur mennir sína egnu loysn

*Rættarvirknaður av elektroniskari undirskrift*
Eitt av aðalmálunum við talgilda samleikanum er, at føroyska samfelagið fær eina elektroniska undirskrift, ið kann nýtast til at undirskriva løgfrøðiliga bindandi skjøl. Við hesum lógaruppskoti verður ásett, at ein elektronisk undirskrift við talgildum samleika, skal hava sama rættarvirkna sum ein handskrivað undirskrift.

*Fyrisiting av talgilda samleikanum er ein myndugleikaábyrgd*
Við lógaruppskotinum verður staðfest, at fyrisitingin av talgilda samleikanum, m.a. skráseting av brúkarum og útflýggjan av talgildum lyklum til brúkarar, er ein myndugleikaábyrgd, og at fyrisitingarlógin er galdandi fyri tær avgerðir, ið tiknar verða av fyrisitara av talgilda samleikanum, eisini um henda uppgáva verður veitt út til privat virki.

*Heimild til landsstýrismannin at áseta nágreiniligari fyrisitingarligar reglur*
Heimild verður givin landsstýrismanninum at áseta, nágreiniligar reglur til starvsfólk, tænastuveitarar, brúkarar og onnur knýtt at talgilda samleikanum. Í slíkari loysn eru mong krøv viðvíkjandi trygd, bygnaði, mannagongdum, nýtslusemi, brúkaratreytum o.ø. Tað er mett skilagott, ikki at skriva hesi krøv beinleiðis í lógina, tí tað avmarkar smidleikan í samband við víðarimenning av loysnini.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Talgildi samleikin fer væntandi at verða ein týðandi hornasteinur í føroyska KT-undirstøðukervinum, og við hesum lógaruppskoti verða karmarnir fyri loysnina lagdir.

Fyrimunir við hesum er:

- at rættarstøða borgarans verður tryggjað, m.a. við at geva møguleika at kæra avgerðir hjá fyrisitingini av talgilda samleikanum
- at ásett verður við lóg, at allir almennir stovnar, partafeløg, ið tað almenn eigur partapeningin í og peningastovnar skulu nýta somu loysn, so borgarin bert nýtist eina loysn í samskiftinum við tað almenna
- Myndugleikin og ábyrgdin fyri loysnini verður løgd hjá landsstýrisfólkinum
- Rættarvirknaðurin av undirskrift við talgildum samleika verður staðfestur

Vansar við at lóggeva um slíka KT-loysn kunnu verða, at lóggávan kann gerast haft um beinið í mun til víðarimenning av KT-loysnini. Hædd er tikin fyri hesum við ikki at skriva tøknilig krøv inn í sjálva lógina, men at geva landsstýrisfólkinum heimild at áseta hesar reglur í

kunngerð. Hetta verður mett at vera ein smidligari háttur at handfara nýggjar tøkniligar avbjóðingar.

**1.5. Ummæli**
Lógaruppskotið er lagt til ummælis hjá Føroya Landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Talgildur samleiki verkætlanin er ein av høvuðstættunum í Talgildu Føroyar verkætlanini.

Í verkætlanartíðarskeiðinum, ið gongur fram til og við ár 2020, er talgildur samleiki verkætlanin fíggjað av játtanini til Talgildu Føroyar.

Útreiðslur hjá landinum til verkætlanina, Talgildu Føroyar, eru heimilaðar umvegis løgtingslóg nr. 77 frá 29. mai 2017 um Talgildu Føroyar. Landið fíggjar 60 % av verkætlanini (í mesta lagið 90 mió. kr.), meðan ætlanin er, privatar og almenn virkir, grunnar og kommunur umvegis avtalu við landsstýrisfólkið fíggja 40 %. Avtalur eru gjørdar við privatar fyritøkur og almenn partafeløg um fígging á 35 mió. kr. og avtalur eru gjørdar og ávegis við kommunur um fígging.

Í verkætlanartíðarskeiðinum 2016 – 2020 eru settar av kr. 46,7 mió. til talgilda samleika verkætlanina. Í hesum liggur serliga verkætlanarfyrireiking, menning av KT-loysn og fyrisiting av talgilda samleikanum, undir hesum eisini rakstur av KT-loysnini.

Eftir 2020 skal talgildi samleikin, tvs. fyrisitingin og KT-loysnin rekast og viðlíkahaldast víðari. Fíggjarleistur fyri hetta tíðarskeið er ikki avtalaður.

Uppgávan at menna og seta í verk talgilda samleikan verður framd av samtakinum Klintra og Føroya Tele. Kostnaðurin fyri menningina og at seta í verk loysnina er avtalaður at vera 16,4 mió. kr. Harumframt kemur árligt viðlíkahalds- og supportgjald á 2,8 mió. kr. til Klintra og Føroya Tele og undirveitarar.

Uppgávan at reka talgildan samleikan verður framd av Elektron. Kostnaðurin fyri raksturin av talgilda samleikanum er avtalaður at vera uml. 1,7 mió. kr. árliga.

Almennir stovnar undir landinum og kommunum fáa útreiðslur av at knýta talgilda samleikan til sínar talgildu tænastur. Hetta knýti verður gjørt smb. opnum kendum standardum og verður tí lutfalsliga einfalt. Útreiðslur í hesum sambandi kunnu verða til KT-menning og ella tillaging av loysnum og mannagongdum. Tó verður mett, at gagnið við talgilda samleikanum verður størri enn útreiðslurnar fyri einstøku stovnarnar. Neyðugt verður ikki at menna egnar loysnir til elektroniska eyðmerking og undirskrift. Í staðin fáa stovnar eina loysn, ið lutfalsliga lætt og skjótt kann takast í nýtslu.

Samfelagsligi ágóðin av talgilda samleikanum økist í takt við útbreiðsluna. Tað verður alsamt léttari og minni tíðarkrevjandi hjá borgarum at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna, eins og tað verður munandi léttari hjá virkjum og stovnum at tæna kundunum.
Ein talgildur samleiki er ein fyritreyt fyri, at Føroyar fáa ein effektivari og smidligari almennan geira. Tað merkir, at við einum talgildum samleika, kann játtanin til ymisku vælferðarøkini verða brúkt meira skynsamt.

Torført er neyvt at meta um, hvussu stórt gagn stendst av talgilda samleikanum, men ábendingar fáast við at kaga eftir londum, ið longu hava sett líknandi átøk í verk.

Í Estlandi metir fíggjarmálaráðið, at samlaða gagnið av at seta ein talgildan samleika í verk, er tvey prosent av BTÚ. Roknað um til føroysk viðurskifti, svarar hetta til eitt árligt virði á meiri enn 380 mió. kr. Um bert helmingurin av hesi sparing fæst til høldar í Føroyum, merkir tað eina sparing á meiri enn 190 mió. kr. Sparingin er roknað sum tann tíðarsparing, ið fæst við at nýta talgilda samleikan og atknýttu talgildu tænasturnar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Talgildi samleikin verður eftir ætlan klárur at taka í nýtslu fyrsta ársfjórðing í 2019, og skal eftir hetta í rakstur. Ymiskar fyrisitingarligar uppgávur eru fyri tað almenna, eftir at talgildi samleikin er farin í rakstur.

Hesar uppgávur eru:

1. Myndugleikauppgávan, ið fevnir um at tryggja rakstur, viðlíkahald og víðarimenning av loysnini. Hetta fevnir m.a. um:

- at tryggja at rakstrarveitarin lyftur rakstraruppgávuna á fullgóðan hátt sambært sáttmála um tænastustig (SLA) millum partarnar.
- handfara spurningar um trygd
- tryggja at møgulig trygdarálop verða handfarin á rættan hátt
- umboða Føroyar í altjóða høpi og virka fyri altjóða góðkenning av loysnini
- keypa inn tænastur uttanífrá t.d. trygdarskoðanir.
- greiða úr hondum møgulig nýggj útboð viðvíkjandi loysnini.

Henda mynduleikauppgáva krevur uml. 1 ársverk og skal væntandi liggja á Gjaldstovuni.

Harumframt koma at vera uppgávur, ið venda sær beinleiðis til brúkaran av talgilda samleikanum. Hetta fevnir um:

- at veita 1. level support til brúkarar av talgilda samleikanum.
- at umsita brúkarar í KT-loysnini handan talgilda samleikan og skráseta nýggjar brúkarar og útflýggja talgildar lyklar.

Borgarin skal eisini kunna møta upp hjá einum myndugleika, og skráseta seg sum brúkara av loysnini umframt at fáa vegleiðing um, hvussu loysnin skal nýtast. Hvør skal røkja hesa uppgávu, skal avtalast við einstøku myndugleikarnar. Starvsfólkini hjá hesum myndugleikum fáa viðkomandi upplæring at røkja nevndu uppgávur. Hetta verður ein útreiðsla, ið Talgildu Føroyar koma at bera.

Hetta fer at krevja uml. 4 ársverk.

Omanfyristandandi uppgávur fíggjast umvegis játtanina til Talgildu Føroyar fram til árslok 2020. Fíggingarleistur eftir hetta tíðarskeið er ikki avtalaður enn.

Tá talgildi samleikin er settur í verk í fullum líki og knýttur at tænastum hjá almennum stovnum, bæði hjá landi og kommunum, verður møguligt hjá borgaranum og virkjum í størri mun at avgreiða síni viðurskifti talgilt. Hetta fer at frígeva orku í umsitingini hjá almennu stovnunum og privatum virkjum.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Við at knýta sínar talgildu tænastur til talgilda samleikan, kann hetta skapa grundarlag fyri effektiviseringum og eini betri kundatænastu hjá vinnuni. Virkir sleppa undan at menna egnar loysnir til elektroniska eyðmerking og undirskrift, og fáa eina loysn, ið lutfalsliga lætt og skjótt kann knýtast at teirra tænastum.

Sum nevnt í 2.2., fer talgildi samleikin eisini at gera, at tað verður skjótari og lættari at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna, og harvið skapa grundarlag fyri at frígeva orku í umsitingini hjá virkjum.

Eins og fyri almennar stovnar, vil knýtið í talgilda samleika viðføra tillagingar av teirra KT-loysnum. Tó verður mett, at gagnið við talgilda samleikanum fyri einstaka virki verður størri enn útreiðslurnar av hesum tillagingum.
Landsstýrið og Felagið fyri føroyskar peningastovnar undirskrivaðu 1. juli 2016 samstarvsavtalu um, at føroyskir borgarar skulu kunna nýta føroyska samleikan til talgildar tænastur hjá peningastovnum í Føroyum. Hetta lógaruppskot staðfestir, at føroysku peningastovnarnir skulu bjóða kundum sínum at nýta talgilda samleikan, og hetta er sostatt ein staðfesting av avtaluni frá 2016.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Árin av talgilda samleikanum verður væntandi, at minni pappír verður brúkt í privatari- og almennari umsiting.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Talgildi samleikin fer at geva fólki í útjaðaranum og sjófólki á fjarleiðum betri møguleikar at avgreiða síni viðurskifti uttan ta tíðar- og orkunýtslu, sum fer til slíkt í dag.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Talgildi samleikin hevur jaligar sosialar avleiðingar fyri borgarar í síni heild.

Talgildi samleikin skal m.a. gera tað lættari hjá teimum við skerdum førleika, teimum, sum eru stødd á útoyggj, til skips ella uttanlands at brúka almennar og privatar tænasturnar, tá hesar velja at knýta talgilda samleikan til sínar talgildu tænastur.

Talgildi samleikin kemur ikki at krevja telefonsamband (sum t.d. MínLykil), men bert internet samband. Hetta verður mett sum ein fyrimunur, serliga fyri føroysk sjófólk.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

Avgjørt er, at talgildi samleikin skal mennast í samsvar við krøv í eIDAS (EU-forordning nr. 910/2014 af 23. juli 2014). Hetta skal slóða fyri millumlandasáttmálum um sínámillum viðurkenning av talgilda samleikanum og líknandi loysnum í ES-londum umframt øðrum londum.
Endamálið við hesum er, at talgildi samleikin í framtíðini kann viðurkennast sum elektroniskt samleikaprógv og bindandi undirskrift víða um heim, t.d. í samband við handil ella almennar tænastuveitingar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er mett í mun til Mannarættindasáttmálan og ST-sáttmálan um rættindi hjá teimum, ið bera brek.

Talgildi samleikin fer at styrkja støðuna hjá teimum, ið bera brek, av teirri orsøk, at talgildi samleikin vil lætta um atgongdina til almennar tænastur v.m.

Uppskotið er í samsvari við Mannarættindasáttmálan.

Uppskotið hevur fyrilit fyri ásetingunum í ST-sáttmálanum um rættindi hjá teimum, ið bera brek, tí eingin skal so vítt gjørligt, verða forðaður í at fáa ein talgildan samleikan. Talgildi

samleikin skal gera tað lættari hjá teimum, ið bera brek, og teimum, ið eru førleikaskerd. Talgildi samleikin skal gera tað lættari hjá hesum at brúka almennu tænasturnar og aðrar tænastur í felags kervinum.

**2.9. Marknaforðingar**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvur til marknaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
**§ 11.** Persónar, ið útinna uppgávur sbrt. hesi løgtingslóg ella við heimild í hesi løgtingslóg, umframt onnur, ið eru teimum til hjálpar hesum viðvíkjandi, koma undir revsiábyrgd sbrt. §§ 152-152f í revsilógini. Hesir persónar hava tagnarskyldu mótvegis øðrum hvat viðvíkur upplýsingar um persónar og um KT-skipanina handan talgilda samleikan, serliga viðvíkjandi tøkni, trygd og bygnað og um tilgongdir, viðlíkahald og rakstur av trygdarviðurskiftum.

Henda tagnarskyldan við tilvísing til galdandi reglur í revsilógini merkir, at upplýsingar um persónar og KT-loysnina handan talgilda samleikan, skulu viðgerast við serligum atliti til trúnað. Serliga eru tað upplýsingar um trygd og mannagongdir v.m. ið kunna hava sera skaðiligar avleiðingar fyri samfelagið, um hesar koma í skeivar hendur.

Revsing er mett neyðug og hóskandi fyri at tryggja, at allir persónar, ið á ein ella annan hátt eru knýttir at talgilda samleikanum, eru tilvitaðir um, at talan er um samfelagskritiska loysn og at revsing við bót ella fongsul fylgir, um hesar reglur ikki verða fylgdar.

**§ 12.** Um ikki strangari revsing er í aðrari lóggávu, sektast við bót tann, ið við vilja ella av grovum ósketni brýtur ásetingar ásettar við heimild í § 9.

Sbrt. § 9, kann landsstýrismaðurin áseta nágreiniligari reglur til hvussu talgildi samleikin skal verða fyrisitin, sbrt. §§ 7-8, umframt reglur til starvsfólk, tænastuveitarar, brúkarar og annað knýtt at talgilda samleikanum, undir hesum KT-trygd, karmar og politikkir. Hesar reglur skulu tryggja, at loysnin verður ment og rikin á tryggan og fullgóðan hátt.

Meðan § 11 snýr seg um tagnarskyldu, fevnir § 12 um meira enn bara brot á reglur um tagnarskyldu. Endamálið er serliga at hava revsiheimild til brot á trygdareglur.

Talgildi samleikin kemur at vera ein samfelagskritisk loysn, og tað kann hava álvarsligar avleiðingar fyri bæði tað almenna, vinnuna og borgaran, um persónar knýttir at loysnini t.d. ikki taka trygdarásetingar í álvara, ikki viðgerða persónsupplýsingar á fullgóðan hátt ella ikki virða ásettar mannagongdir.

Revsing er mett neyðug fyri at tryggja, at allir persónar, ið, á ein ella annan hátt, eru knýttir at talgilda samleikanum eru tilvitaðir um, at talan er um samfelagskritiska loysn og at revsing fylgir, um reglurnar ikki verða fylgdar.

Revsing við bót er mett sum hóskandi inntriv í mun til lógarbrotið.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nágreiniligari reglur um gjald fyri útreiðslur sum landi hevur av talgilda samleikanum.

Her verður serliga hugsað um gjald fyri útreiðslur hjá landsstýrismanninum í samband við at knýta talgilda samleikan til talgildu tænasturnar hjá tænastuveitarum umframt rakstrarútreiðslur. Gjaldið má ikki vera hægri enn útreiðslurnar, sum eru av virkseminum í samband við ta ítøkiligu tænastuna.

Ætlanin er, at tað sum útgangsstøði skal vera ókeypis fyri borgaran at fáa og nýta talgilda samleikan. Tó er hetta ikki skrivað inn í lógartekstin av teirri orsøk, at tað í ávísum førum kann vera rímiligt at krevja eitt ávíst gjald. Hetta kann t.d. vera, um brúkarin í fleiri umførum innan fyri stutt tíðarskeið biður um nýggjan talgildan samleika (t.d. av tí at hann í ósketni hevur mist hann burtur) ella um brúkarin longu hevur ein talgildan samleika á síni snildfon, men eisini ynskir at fáa hann á einum USB ella øðrum tóli.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki borgaranum skyldu til at fáa talgildan samleika.

Lógaruppskotið ásetur, at allir almennir stovnar, bæði undir landi og kommunum, í Føroyum skulu loyva persónum at nýta talgilda samleikan, um stovnurin veitir tænastur, ið krevja elektroniska eyðmerking av persónum ella elektroniska undirskrift.

Endamálið við hesum er:
- at borgarin ikki skal nýta fleiri ymiskar loysnir til elektroniska eyðmerking og elektroniska undirskrift til almennar tænastur
- at tað viðførir sparingar fyri tað almenna, at hava felags loysn, heldur enn at hvør stovur skal menna egnar loysnir

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**

<u>Heimildir til landsstýrismannin:</u>
**§ 2.** Ásett verður, at landsstýrismaðurin ger av, hvør KT-loysn skal nýtast sum “talgildur samleiki” og vera fevnd av ásetingunum í hesum lógaruppskoti.

Við gildiskomu av hesi løgtingslóg skal henda loysn vera tann KT-loysn, ið Klintra og Føroya Tele eru í gongd við at menna (útboð vunnið í juni 2017) og væntandi fer í rakstur fyrsta ársfjórðing av 2019.

Landsstýrismaðurin hevur heimild at velja aðra loysn enn omanfyrinevndu.

**§ 7, stk. 2.** Ásett verður, at landsstýrismaðurin kann loyva øðrum persónum enn teir nevndir í § 7, stk. 1 at gerast brúkarar við fullum ella avmarkaðum rættindum til talgilda samleikan.

Endamálið er, at um tað í framtíðini verður mett skilagott, at eisini útflýggja talgildan samleika til t.d. børn undir 15 ár (t.d. sum elektronisk eyðmerking til talgilda skúlasíðu), útlendingar uttan p-tal, ið hava viðurskifti við almennu Føroyar, ella onnur.

Landsstýrismaðurin kann avgera, um hesir persónar skulu gerast brúkarar við fullum ella avmarkaðum rættindum til talgilda samleikan. Ein talgildur samleiki við avmarkaðum rættindum, er ein samleiki, ið er avmarkaður í funksjón (t.d. bert loyvir elektronisk eyðmerking, men ikki elektroniska undirskrift) ella í atkomurættindum (t.d. bert loyvir atgongd til avísa talgilda tænastu, sum t.d. Borgaragluggan hjá TAKS, men ikki aðrar tænastur).

**§ 8, stk. 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at útveita umsiting av brúkarum og útflýggjan av talgildum lyklum til brúkarar av talgilda samleikanum til privat virki.

Orsøkin til hesa grein er, at tað kunnu vera fyrimunir í at útveita hesa uppgávu (vanliga nevnd "RA – Registration Authority" á fakmáli) til privat virki. Hetta er t.d. sæð í okkara nærmastu grannalondum, har bankarnir kunnu umsita og útflýggja talgildar lyklar til brúkarar. Grundgevingin fyri hesum er m.a., at sera strong "know-your-customer" krøv eru til bankarnar, og tískil kunnu hesir væl tryggja, at ein persónur er tann hann sigur seg vera.

Í uppgávuni at umsita brúkarar og útflýggja talgildar lyklar til brúkarar av talgilda samleikanum liggur m.a. hetta, at meta um ein persónur lýkur krøvini í § 7, stk. 1 um at skjalprógva sín likamliga samleika nøktandi, og eftir hetta avgera, um viðkomandi persónur kann gerast brúkari av talgilda samleikanum.
Viðkomandi, ið greiður úr hondum hesa uppgávu, tekur tískil eina fyrisitingarrættarliga avgerð. Um ein persónur verður noktaður at gerast brúkari av talgilda samleikanum, kann hetta hava tyngjandi avleiðingar fyri viðkomandi persón. Av tí orsøk er ásett í § 8, stk. 2, at avgerðir, ið privat virki hevur ella fer at taka, sbrt. § 8, stk. 1, skulu lúka treytir í løgtingslóg um fyrisitingarlóg. Tískil skal við noktanini fylgja grundgeving og kæruvegleiðing og onnur rættindi hjá persóninum sbrt. fyrisitingarlógini.

**§ 9.** Landsstýrismaðurin kann áseta nágreiniligari reglur fyri, hvussu talgildi samleikin skal verða fyrisitin, sbrt. §§ 7-8, umframt reglur fyri starvsfólk, tænastuveitarar, brúkarar og annað knýtt at talgilda samleikanum, undir hesum KT-trygd, karmar og politikkir.

Tað er mett sum ein fyrimunur, at ikki skriva teknisk krøv inn í sjálvan lógartekstin, men at geva landsstýrismanninum heimild at áseta hesar reglur í kunngerð. Hetta verður mett at vera ein meir smidligur háttur at taka við nýggjum tøkniligum avbjóðingum. Hesar kunngerðir kunnu snúgva seg um trygd, bygna, mannagongdir, nýtslusemi, brúkaratreytir o.a.

**§ 10, stk. 2.** Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleikan eftir § 10, stk. 1 til ávísan kærustovn, og kann samstundis áseta, at avgerðir hjá hesum eru endaligar.

Um tað verður mett, at tað er skilabetri at kærur verða sendar til ávísan kærustovn heldur enn til landsstýrismannin, hevur landsstýrismaðurin heimild at áseta hetta. Eisini kann landsstýrismaðurin áseta, at avgerðir hjá hesum útvalda kærustovni eru endaligar í fyrisitingini.

**§ 13.** Landsstýrismaðurin kann áseta nágreiniligari reglur um gjald fyri útreiðslur sum landið hevur av talgilda samleikanum. Sí 2.12.

**§ 14.** Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur við onnur lond og samveldi um viðurkenning og brúk av talgilda samleikanum og líknandi samleikaloysnum hjá hvør øðrum.

Talgildi samleikin skal mennast og víðarimennast sambært altjóða fyrisettum málum og loysnum, so at føroyski talgildi samleikin í framtíðini skal kunna nýtast í øðrum londum. Landsstýrismaðurin verður við hesum heimilaður at gera avtalur við onnur lond og samveldi (t.d. ES) um viðurkenning av talgilda samleikanum í øðrum londum.

**§ 15, stk. 2.** Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, nær § 4, stk. 1 og § 5 koma í gildi.

Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetir, nær § 4, stk. 1 kemur í gildi. Orsøkin til hetta er, at elektroniska undirskriftin møguliga ikki verður við frá fyrsta degi hjá talgilda samleikanum. Væntað verður tó, at elektroniska undirskrift verður partur av talgilda samleikanum seinast eitt ár eftir, at loysnin fer í rakstur.
Tøknin viðvíkjandi elektroniskari undirskrift er í stórari broyting í skrivandi løtu (serliga verður her hugsað um remote-signature tøknina og nýggjar ávegis standardir so sum prEN 419 241-1 og prEN 419 241-2), og tí er mett skilagott, at valið av tí undirveitara, ið skal útvega tøknina til elektronisku undirskriftina, møguliga verður útsett í eina tíð.

Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetir, nær § 5 kemur í gildi.
Orsøkin til hetta er, at skotbrá má gevast til almennar stovnar áðrenn kravt verður, at hesir skulu nýta talgilda samleikan til sínar talgildu tænastur. Hetta krevur helst menning og ella tillagingar í teirra KT-loysnum, og tí er rímiligt at geva ávíst skotbrá, innan hetta krav kemur í gildi. Harumframt er talgildi samleikin enn ikki liðugt mentur tá hetta lógaruppskot verður lagt fram, og tí er ilt at siga, júst nær tað klárt er seta hetta krav í gildi.

§ 4, stk. 1 og § 5 kunnu hava ymiskar gildiskomur.

<u>Heimildir til annan landsstýrismann:</u>
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Her verður ásett, hvat løgtingslógin fevnir um. Løgtingslógin fevnir um fyrisiting og nýtslu av talgildum samleika.

Fyrisiting: Fyrisitingarligar uppgávur knýttar at talgilda samleikanum kunnu t.d. vera í samband við:

- menning av KT-loysnini handan talgilda samleikan. Veitarin vanliga funnin umvegis alment útboð.
- rakstur av KT-loysnini handan talgilda samleikan. Veitarin vanliga funnin umvegis alment útboð.
- at umsita brúkarar og útflýggja talgildar lyklar (uppgávan vanliga nevnd "RA – Registration Authority" á fakmáli). Kann vera útveitt til privat virki, sbrt. § 8, stk. 1, ið landsstýrismaðurin ger avtalu við og setur krøv til.
- support uppgávur. Hetta kann vera support til brúkaran av talgilda samleikanum (1. level support) ella support viðvíkjandi KT-loysnini handan talgilda samleikan (2nd og 3rd level support).
- víðarimenning av KT-loysnini handan talgilda samleikan. Veitarin vanliga funnin umvegis alment útboð.

Nýtsla: Nýtsla av talgildum samleika er, tá likamligur persónur nýtir talgilda samleikan til elektroniska eyðmerking ella elektroniska undirskrift á tænastu hjá tænastuveitara.

Talgildur samleiki er nágreiniligari lýstur í § 3, nr. 1)

**Til § 2**
Ásett verður, at landsstýrismaðurin ger av, hvør KT-loysn skal vera nýtt sum talgildur samleiki og vera fevnd av ásetingunum í hesi løgtingslóg.

Við gildiskomu av hesi løgtingslóg skal henda loysn vera tann KT-loysn, ið Klintra og Føroya Tele eru í gongd við at menna (útboð vunnið í juni 2017) og væntandi er klár at fara í rakstur fyrsta ársfjórðing av 2019.
Uppgávan at reka talgildan samleikan var send í útboð 20. apríl 2018. Elektron vann útboðið, og skal tískil taka sær av rakstrinum fyrstu fimm árini.

Landsstýrismaðurin hevur tó við hesi grein, heimild at velja aðra loysn enn omanfyrinevndu, sum almenna føroyska KT-loysnin til elektroniska eyðmerking og til elektroniska undirskrift.

Loysnin kann eisini vera býtt sundur í ymiskar partar/komponentar, ið ymiskir veitarar kunnu veita, t.d. at ein veitari veitir elektroniska eyðmerking og ein annar veitir elektroniska undirskrift ella annað.

Hetta skal gerast sambært føroyskum útboðsreglum.

Sjálvt heitið á KT-loysnin kann verða annað enn talgildur samleiki. Um annað heiti verður valt, kann KT-loysnin framvegis vera fevnd av hesi løgtingslóg.

**Til § 3**

*Til nr. 1)*
Talgildur samleiki er almenna føroyska KT-loysnin til elektroniska eyðmerking av brúkarum og til elektroniska undirskrift. Við gildiskomu av hesi løgtingslóg skal henda loysn vera tann KT-loysn, ið Klintra og Føroya Tele eru í gongd við at menna (útboð vunnið í juni 2017) og væntandi er klár at fara í rakstur í fyrru hálvu av 2019.

Við hesi løgtingslóg verður ábyrgdin fyri talgilda samleikan formliga løgd hjá landsstýrismanninum.

*Til nr. 2)*
Tænastuveitari: Almennur stovnur ella virki, ið bjóðar fram tænastu, har talgildur samleiki verður nýttur sum elektronisk eyðmerking ella elektronisk undirskrift. Ein tænastuveitari kann t.d. vera TAKS, Akstovan, bankarnir, tryggingarfeløg o.fl.

Ætlanin er ikki, at allýsingin skal lesast avmarkandi, men fevna um einhvønn tænastuveitara, ið bjóðar fram tænastu, har talgildur samleiki verður nýttur til elektronisk eyðmerking ella elektronisk undirskrift.

*Til nr. 3)*
Tænasta: Talgild tænasta frá tænastuveitara, ið krevur talgildan samleika til elektroniska eyðmerking av brúkarum ella elektroniska undirskrift. Ein tænasta kann t.d. vera Borgaragluggin hjá TAKS, netbankin hjá bankunum, sjálvgreiðslusíða til at flyta bústað á heimasíðu hjá kommunu o.fl.

*Til nr. 4)*
Brúkari: Likamligur persónur, ið nýtir talgilda samleikan til tænastu frá tænastuveitara.

Í fyrsta stigi í menningini av talgilda samleikanum verður bert møguligt hjá likamligum persónum at gerast brúkarar av talgilda samleikanum, tvs. privat persónar við p-tali. Tað merkir, at ein løgfrøðiligur persónur, ikki kann hava sín egna talgilda samleika. Tó er ætlanin, at tað skal vera møguligt at knýta V-tøl at talgilda samleikanum hjá privat persónum, og á tann hátt geva einum privat persóni rættindi til at virka vegna eitt virki.

*Til nr. 5)*
Elektronisk eyðmerking: Elektronisk viðgerð, ið sannar eyðmerkingina av einum likamligum persóni.

Tá ein persónur gevur seg til kennar (identifikatión) á einari talgildari tænastu, er týdningarmikið, at tænastan er vís í, at persónurin veruliga er tann, viðkomandi sigur seg vera. Elektronisk eyðmerking við talgildum samleika skal veita brúkarum trygg eyðmerkingarambod, so persónurin kann sanna (autentifikatión) sín samleika mótvegis hesum tænastum.

*Til nr. 6)*
Elektronisk undirskrift: Dátur í elektroniskum formi, ið eru viðfestar ella logiskt sambundnar við øðrum elektroniskum dátum, og sum brúkari nýtir sum undirskrift.

Elektronisk undirskrift við talgildum samleika skal tryggja, at:

- ongin ivi er um, hvør tað er, ið hevur skrivað undir
- ongin ivi er um, nær undirskriva var
- ongin ivi er um, hvørki fyri undirskrivaran ella tænastuveitaran, júst hvat tað var, ið varð undirskrivað

Hugtøkini “elektronisk undirskrift” og “talgild undirskrift” verða ofta brúkt hvørt um annað í dagligdegnum, men á fakmáli hava hesi hvør sína merking. Elektronisk undirskrift er yvirskipaða hugtakið um slíkar loysnir, meðan talgild undirskrift (digital signatur) er ein ítøkiligur tekniskur háttur - grundaður á PKI (public key infrastructure) - at seta í verk eina elektroniska undirskrift, ið lýkur ávís krøv. Elektronisk undirskrift er nýtt í lógartekstinum av tí orsøk, at lógin í størst møguligan mun skal vera tøkniliga neutral.

**Til § 4**

*Til stk. 1.*
Henda grein ásetur rættarvirknað av elektroniskari undirskrift við talgildum samleika og nevnir beinleiðis at elektronisk undirskrift við talgildum samleika, skal hava sama rættarvirknað sum ein handskrivað undirskrift.

Eitt av aðalmálunum við talgilda samleikanum er, at borgarin kann undirskriva løgfrøðiliga bindandi skjøl talgilt. Ein handskrivað undirskrift er viðurkend í samfelagnum og í rættarsiðvenju sum bindandi løgfrøðiliga, og við hesari áseting verður elektronisk undirskrift við talgilda samleikanum staðfest at hava sama rættarvirknað.

*Til stk. 2.*
Um serlig formkrøv eru í lóggávuni til eina undirskrift, t.d. um at handskrivað undirskrift skal verða nýtt ella at persónurin skal vera fysiskt tilstaðar í samband við undirskrift, so verður hetta ikki ávirkað av § 4, stk. 1. Tað merkir t.d., at um lóggevari metur, at tað í ávísum førum er skilabetri at nokta elektroniskari undirskrift við talgildum samleika, so stendur tað honum frítt at áseta hetta við lóg.

**Til § 5**
Ásett verður, at allir almennir stovnar og almenn partafeløg umframt peningastovnar skulu loyva persónum at nýta talgilda samleikan, um stovnurin veitir tænastu ið krevur elektroniska eyðmerking av persónum ella elektroniska undirskrift.

Endamálið við hesum er, at almennu Føroyar og peningakervið í Føroyum fáa eina felags loysn fyri alt samfelagið, so borgarin bert skal nýta ein hátt at eyðmerkja seg mótvegis almennum talgildum tænastum. Fyri samfelagið er tað mett sum ein fyrimunur, av tí at tað ikki skulu mennast fleiri ymiskar KT-loysnir til tær einstøku tænasturnar, har elektronisk eyðmerking og undirskrift krevst. Tí fer ein felags loysn fyri alt samfelagið væntandi at hava munandi sparingar við sær fyri allar partar, bæði í tíð og umsiting.

Allar lønarflytingar fara umvegis føroyskar peningastovnar í dag, og er hetta ein av orsøkunum til, at peningastovnarnir eru fevnir av kravinum um, at borgarar skulu kunna nýta talgilda samleikan til tænastur hjá peningastovnum í Føroyum. Samstarvsavtala er eisini gjørd millum landsstýrið og peningastovnarnar um hetta. Kravið um, at peningastovnarnir skulu nýta talgilda samleikan er tó bert galdandi í tann mun at talgildi samleikin livir upp til tey krøv, ið føroysku peningastovnarnir skulu liva upp til á hesum øki sambært lóg um fíggjarligt virksemi.

**Til § 6**
Ásett verður, at privata vinnan kann nýta talgilda samleikan til elektroniska eyðmerking av persónum og til elektroniska undirskrift.

Tað er ikki krav, at privat virki skulu nýta talgilda samleikan, tó undantikið partafeløg, sum tað almenna eigur partapeningin í og peningastovnar, men tað er loyvt, um hesi ynskja tað.

Ynskiligt er, at talgildi samleikin gerst útbreiddur í øllum samfelagnum, so borgarin kann nýta ein og sama hátt at eyðmerkja seg mótvegis talgildum tænastum, bæði tá ið talan er um almennar og privatar tænastur.

**Til § 7**

*Til stk. 1.*
Ásett verða yvirskipaðu krøvini til persónar, ið ynskja at gerast brúkarar av talgilda samleikanum. Persónurin skal vera fyltur 15 ár, hava eitt føroyskt p-tal og kunna skjalprógva sín samleika nøktandi.
At skjalprógva sín samleika nøktandi merkir her, at brúkarin vísur nøktandi prógv fyri sín samleika, sum t.d. pass ella koyrikort. Krøvini til skjalprógvan av samleikanum verða ásett í teimum reglum, ið landsstýrismaðurin ásetur til fyrisitingina av talgilda samleikanum, sbrt. § 9.

Nágreiniligari reglur til teir persónar, ið ynskja at gerast brúkarar av talgilda samleikanum, kunnu ásetast við heimild í § 9. Hetta kann t.d. vera brúkaratreytir, ið brúkarin skal undirskriva, krav um persónliga uppmøting ella annað.

*Til stk. 2.*
Heimild verður givin landsstýrismanninum, at loyva øðrum persónum enn teir nevndir í § 7, stk. 1 at gerast brúkarar við fullum ella avmarkaðum rættindum til talgilda samleikan.

Endamálið er, at um tað í framtíðini verður mett skilagott, at eisini útflýggja talgildan samleika til t.d. børn undir 15 ár (t.d. sum elektronisk eyðmerking til talgilda skúlasíðu), útlendingar uttan p-tal, ið hava viðurskifti við almennu Føroyar, ella onnur.

Landsstýrismaðurin kann avgera, um hesir persónar skulu gerast brúkarar við fullum ella avmarkaðum rættindum til talgilda samleikan. Ein talgildur samleiki við avmarkaðum rættindum, er ein samleiki, ið er avmarkaður í funksjón (t.d. bert loyvir elektronisk eyðmerking, men ikki elektroniska undirskrift) ella í atkomurættindum (t.d. bert loyvir atgongd til avísa talgilda tænastu, sum t.d. Borgaragluggan hjá TAKS, men ikki aðrar tænastur).

*Til stk. 3.*
Ásett verður, at fyrisitingin av talgilda samleikanum hevur heimild at heinta viðkomandi upplýsingar úr kundaskráum hjá veitarum av fjarskiftistænastum.

Endamálið við hesi grein er, at geva skrásetingarmyndugleikanum (RA - Registration Authority) eyka trygd fyri, at ein persónur er tann hann sigur seg vera, í samband við at hesin biður um at gerast brúkari av talgilda samleikanum.

Við at fáa atgongd til kundaskráir hjá veitarum av fjarskiftistænastum, kunnu telefonnummur, adressur o.a. í hesum kundaskráum samanberast við upplýsingarnar, ið viðkomandi persónur upplýsir skrásetingarmyndugleikanum. Um samsvar ikki er millum hesar upplýsingar, kann hetta vera ábending um samleikastuldur.

Ein veitari av fjarskiftistænastum er í hesi lóg, ein veitari, ið er fevndur av fjarskiftislógini (løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2015 um fjarskifti). Viðkomandi veitarar í dag eru serliga Føroya Tele og Hey.

**Til § 8**

*Til stk. 1.*
Heimild verður givin landsstýrismanninum, at útveita umsiting av brúkarum og útflýggjan av talgildum lyklum til brúkarar av talgilda samleikanum til privat virki.

Orsøkin til hesa grein er, at tað kunnu vera fyrimunir í at útveita hesa uppgávu (vanliga nevnd "RA – Registration Authority" á fakmáli) til privat virki. Hetta er t.d. sæð í okkara nærmastu grannalondum, har bankarnir kunnu umsita og útflýggja talgildar lyklar til brúkarar. Grundgevingin fyri hesum er m.a., at sera strong "know-your-customer" krøv eru til bankarnar, og tí skil kunnu hesir væl tryggja, at ein persónur er tann hann sigur seg vera.

Í uppgávuni at umsita brúkarar og útflýggja talgildar lyklar til brúkarar av talgilda samleikanum liggur m.a. hetta, at meta um ein persónur lýkur krøvini í § 7, stk. 1 um at skjalprógva sín likamliga samleika nøktandi, og eftir hetta gera av, um viðkomandi persónur kann gerast brúkari av talgilda samleikanum.
Viðkomandi, ið greiður úr hondum hesa uppgávu, tekur tískil eina fyrisitingarrættarliga avgerð. Um ein persónur verður noktaður at gerast brúkari av talgilda samleikanum, kann hetta hava tyngjandi avleiðingar fyri viðkomandi persón. Av tí orsøk er ásett í § 8, stk. 2, at avgerðir, ið privat virki hevur ella fer at taka, sbrt. § 8, stk. 1, skulu lúka treytir í løgtingslóg um fyrisitingarlóg. Tískil skal við noktan fylgja grundgeving, kæruvegleiðing og onnur rættindi hjá persóninum sbrt. fyrisitingarlógini.

*Til stk. 2.*
Avgerðir, ið privat virki hevur ella fer at taka, sbrt. stk. 1, skulu lúka treytir í løgtingslóg um fyrisitingarlóg (Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg).

Endamálið við hesi áseting er at verja rættindini hjá borgaranum. Um landsstýrismaðurin velur at útveita skrásetingarmyndugleikin (RA) til privata virki, sbrt. § 8, stk. 1, skal borgarin framvegis hava somu rættindi viðvíkjandi avgerðum, ið hetta privat virki hevur ella fer at taka um viðkomandi. Um privata virki t.d. velur at nokta einum borgara at gerast brúkari av talgilda samleikanum, skal borgarin hava rætt til innlit, grundgeving, kæruvegleiðing og onnur rættindi eftir fyrisitingarlógini.

**Til § 9**
Ásett verður, at landsstýrismaðurin ásetur nágreiniligari reglur til fyrisitingina av talgilda samleikanum, viðvíkjandi útflýggjan av talgildum samleika, sbrt. § 7, og nágreiniligari reglur til privat virki, ið umsitur og útflýggjar talgildar lyklar til brúkarar, sbrt. § 8, stk. 1. Harumframt eru øki, ið ikki neyðturviliga eru fevnd av §§ 7-8, og týðandi er, at eisini nágreiniligari reglur verða ásettar fyri hesi øki. Hetta kann vera krøv til KT-trygd, brúkaratreytir til brúkarar ella krøv til tænastuveitarar, ið knýta talgilda samleikan til sínar tænastur, t.d. trygdarkrøv, trust framework, certificate policies og líknandi.

**Til § 10**

*Stk. 1.*
Við hesi grein verður møguligt at kæra avgerðir, tiknar sambært hesi løgtingslóg ella við heimild í hesi løgtingslóg, til landsstýrismannin.

*Stk. 2.*
Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleikan eftir § 10, stk. 1 til ávísan kærustovn, og kann samstundis áseta, at avgerðir hjá hesum útvalda kærustovni eru endaligar, tvs. tær kunnu ikki kærast til annan fyrsitingarligan myndugleika.

*Stk. 3.*
Kærumyndugleikin, sbrt. § 10, stk. 1 og 2, kann biðja um allar tær upplýsingar frá privatum virkjum sbrt. § 8, stk. 1, ið eru neyðugar fyri kæruviðgerðina.

**Til § 11**
Persónsupplýsingarlógin er løgfrøðiliga grundarlagið undir viðgerð av persónsupplýsingum í samband við talgilda samleikan, og henda lóg er galdandi og ikki neyðug at nevna serstakt í hesum lógaruppskoti. Persónsupplýsingarlógin tryggjar, at persónsupplýsingar ikki verða brúktir, latnir víðari ella goymdir uttan fyrilit fyri reglunum, sum verja persónar móti, at viðbreknir persónsupplýsingar av órøttum kunnu verða brúktir av øðrum ella brúktir í elektroniskum loysnum á ein óheimilaðan hátt.

Við hesi áseting í § 11 verður áløgd tagnarskylda við tilvísing til galdandi reglur í revsilógini. Hetta merkir, at tað ikki bert eru tær upplýsingar av persónligum slagi sambært lógini um persónsupplýsingar, sum skulu verjast, men eisini upplýsingar um KT-skipanina handan talgilda samleikan og ikki minst upplýsingar knýttar at tí at tryggja eitt høgt trygdarstig í KT-skipanini.

Sbrt. § 152, stk. 3. í revsilógini er ein "*oplysning er fortrolig, når den ved lov... er betegnet som sådan, eller når det i øvrigt er nødvendigt at hemmeligholde den for at varetage væsentlige hensyn til offentlige eller private interesser."*
Við hesi grein verður við lóg sligið fast, at upplýsingar um persónar og um KT-loysnina handan talgilda samleikan eru trúnaðar upplýsingar (fortrolige).

Umframt persónar, ið útinna uppgávur sambært hesi løgtingslóg ella við heimild í hesi løgtingslóg, er henda tagnarskylda eisini galdandi fyri persónar, ið ikki eru í neyðturviliga eru í føstum starvi, men sum hjálpa til at útinna uppgávurnar. Ofta vil talan her verða um telduserfrøðingar av ymiskum slagi og KT-grannskoðarar av KT-loysnini.

Revsing er mett neyðug og hóskandi fyri at tryggja, at allir persónar, ið á ein ella annan hátt eru knýttir at talgilda samleikanum, eru tilvitaðir um, at talan er um samfelagskritiska loysn og at revsing við bót ella fongsul fylgir, um hesar reglur ikki verða fylgdar.

**Til § 12**
Meðan § 11 snýr seg um tagnarskyldu, so fevnir § 12 um meira enn bara brot á reglur um tagnarskyldu. Endamálið er serliga at hava revsiheimild til brot á trygdareglur.

Talgildi samleikin kemur at vera ein samfelagskritisk loysn, og tað kann hava álvarsligar avleiðingar fyri bæði tað almenna, vinnuna og borgaran, um persónar knýttir at loysnini t.d. ikki taka trygdarásetingar í álvara, ikki viðgerða persónsupplýsingar á fullgóðan hátt ella ikki virða ásettu mannagongdir.

Revsing er mett neyðug fyri at tryggja, at allir persónar, ið, á ein ella annan hátt, eru knýttir at talgilda samleikanum, eru tilvitaðir um, at talan er um samfelagskritiska loysn og at revsing fylgir, um reglurnar ikki verða fylgdar.

Revsing við bót er mett sum hóskandi inntriv í mun til lógarbrotið.

**Til § 13**
Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nágreiniligari reglur um gjald fyri útreiðslur sum landið hevur av talgilda samleikanum.

Her verður serliga hugsað um gjald frá tænastuveitarum fyri útreiðslur í samband við at knýta talgilda samleikan til tænastur hjá tænastuveitaranum umframt rakstrarútreiðslur. Gjaldið má ikki vera hægri enn útreiðslurnar, sum eru av virkseminum í samband við ta ítøkiligu tænastuna.

Ætlanin er, at tað sum útgangsstøði skal vera ókeypis fyri borgaran at fáa og nýta talgilda samleikan. Tó er hetta ikki skrivað inn í lógartekstin av teirri orsøk, at tað í ávísum førum kann vera rímiligt at krevja eitt ávíst gjald. Hetta kann t.d. vera, um brúkarin í fleiri umførum innan fyri stutt tíðarskeið biður um nýggjan talgildan samleika (t.d. av tí at hann í ósketni hevur mist hann burtur) ella um brúkarin longu hevur ein talgildan samleika á síni snildfon, men eisini ynskir at fáa hann á einum USB ella øðrum tóli.

**Til § 14**
Fyri at slóða fyri sínámillum viðurkenning av loysnum millum Føroyar og umheimin verður landsstýrismaðurin heimilaður at gera millumlandaavtalur um sínámillum viðurkenning av talgilda samleikanum og líknandi útlendskum loysnum til elektroniska eyðmerking og elektroniska undirskrift, hjá hvør øðrum. Hetta er neyðugt fyri at økja um tænastu-møguleikarnar og tryggja, at føroyskt útflýggjaði talgildi samleikin ikki er avmarkaður til nýtslu í Føroyum og føroyskar tænastuveitarar. Við øðrum orðum, so er endamálið við millumlanda viðurkenning, at føroyskt útflýggjaði talgildi samleikin skal kunna nýtast til almennar tænastuveitingar og í handilsviðurskiftum, víða um heim.

**Til § 15**

*Til stk. 1.*
Skotið verður upp, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó § 4, stk. 1 og § 5 undantikin.

*Til stk. 2.*
Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetir, nær § 4, stk. 1 kemur í gildi. Orsøkin til hetta er, at elektroniska undirskriftin møguliga ikki verður við frá fyrsta degi hjá talgilda samleikanum. Væntað verður tó, at elektroniska undirskrift verður partur av talgilda samleikanum seinast eitt ár eftir, at loysnin fer í rakstur.
Tøknin viðvíkjandi elektroniskari undirskrift er í stórari broyting í skrivandi løtu (serliga verður her hugsað um remote-signature tøknina og nýggjar ávegis standardir, so sum prEN 419 241-1 og prEN 419 241-2), og tí er mett skilagott, at valið av tí undirveitara, ið skal útvega tøknina til elektronisku undirskriftina, møguliga verður útsett í eina tíð.

Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetir, nær § 5 kemur í gildi. Orsøkin til hetta er, at skotbrá má gevast til almennar stovnar áðrenn kravt verður, at hesir skulu nýta talgilda samleikan til sínar talgildu tænastur. Hetta krevur helst menning og ella tillagingar í teirra KT-loysnum, og tí er rímiligt at geva ávíst skotbrá, innan hetta krav kemur í gildi.

Harumframt er talgildi samleikin enn ikki liðugt mentur tá hetta lógaruppskot verður lagt fram, og tí er ilt at siga, júst nær tað klárt er seta hetta krav í gildi.
Kravið um, at peningastovnarnir skulu nýta talgilda samleikan er hartil bert galdandi í tann mun at talgildi samleikin livir upp til tey krøv, ið føroysku peningastovnarnir skulu liva upp til á hesum øki sambært lóg um fíggjarligt virksemi. Við at landsstýrismaðurin kann áseta í kunngerð, nær §5, stk. 2, kemur í gildi, ber til at bíða við at seta kravið til føroyskar peningastovnar í gildi, til føroyski talgildi samleikin livir upp til tey krøv, ið føroysku peningastovnarnir skulu liva upp til sambært lóg.

§ 4, stk. 1 og § 5 kunnu hava ymiskar gildiskomur.

Fíggjarmálaráðið, dagfesting 2. oktober 2018

**Kristina Háfoss**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason